# Dansiveturin 2017/18



**Dagbók. Hvat vit kvøða o.t.**
Í vetur fara vit at leggja dent á at kvøða stutt aftrat tí vanliga.
Fara at kveita dúgliga í Føroya fólks sangbók.

**20-10.2017. Fyrsta kvøld á vetrinum. 29 fólk.**
Kvóðu "Teir sigla so væl sín fríða knørr", sitandi kvøðing úr Føroya fólks.
Hin føroyski dansurin, Ivan skipaði.
Blakman konge, Anfinnur.
Stolt Signhild, Kristian.
Teir sigla so væl sín fríða knørr, Jens skipaði (upp úr arki).
*Kaffisteðgur.*
Norska løva, Kathrina.
Kom upp á fjallatind, Zacharias.
Gáturíma, Kristian.
Hvørjum man tykja vakurt hjá sær, Jens.

**27-10-2017. Annað kvøld á vetrinum. 18 fólk**
Tað gjørdist heilt keðiligt veður út á seinnapartin, nógvur vindur, so fólk vandaðu veður. Avboð fingu vit frá tveimum av trimum, sum vóru á skránni. Vit avlýstu kortini ikki – sum var upp á tal, og væntaðu lítið fólk.

Kom upp á fjallatind, Zacharias, sitandi kvøðing (á skránni).
Ragin smiður, 22 ørindir, Hans.
Brynhildartáttur, 27 ørindir, Kristian.
Runsivalsstríðið, 51 ørindir, Leivur.
*Kaffisteðgur. Pálin og Beinta.*
Kom upp á fjallatind, Zacharias.
Jákupsa skegg, Dia.
Landbukkutátturin, Hans.
Ormur bóndi á ytra Skála, Kristian.

Viðmerking: Hóast vit vóru fá hetta ilsliga kvøld, og skiparar høvdu forfall, fingu vit eitt framúr gott dansikvøld við brotum úr stórum kvæðum – umframt góðar tættir.

**30-10-2017. Boðin at kvøða á Giljagarði, eldrabýlinum í Leirvík. 9 fólk,** harav ein smádrongur úr Kollafirði. Kvøldið var útsett eina lítla viku orsaka av einum deyðsfalli.Tað gekk eitt sindur striltið at fáa fólk, tí vóru tey bara 9, men dansurin gekk væl, fólk komu uppí, og blíðskapurin var stórur. Tað varð kvøðið:

Føroyingar, sum her nú koma saman, Sjúrður Ferjá;

Stolt Signhild, Kristian Jacobsen;
Í Gøtu ein dag, Leivur Sørensen;
Væl komnir føroyingar her í vási, Ivan formaður;
Burtur á Heiði/Veturin kom, Anna Sørensen;
Mallebro, Leivur Sørensen.
Formaðurin sigur, at hetta var ein góð og gevandi løta, hóast tey vóru fá. Vit takka Giljagarði. jd.

**03-11-2017. Triðja kvøld á vetrinum, 40 fólk.**
"Vit kvøða brúðarvísur" er setningurin fyri kvøldið. Kortini byrjaðu vit við "Teir sigla so væl sín fríða knørr" úr Føroya fólks, tí Louis var komin í dans eftir ringt krím. Hesa vísu fara vit at læra okkum væl. Onkrir skiparar høvdu forfall – onkur var til skips – so skipara-rokadur blivu gjørdar.

Brúðarvísan, tann føroyska hjá IPG, Kathrina Hansen; Fisken tager sin føde i vand, Andras Hansen; *Kaffipausa; vertir: Sunneva og Elsa.*

Leivur Øssursson, Joen Carl Danielsen;
Harra Pætur og Elinborg. Elin Henriksen;
Kong Hans, Joen Carl D.
Av hesum eru Fisken og Kong Hans - serliga Fisken – lítið kvøddar nú, so hugtakandi var, hvussu væl hesar vøkru og poetisku vísur gingu.

**10-11-2017. Fjórða kvøld á vetrinum, fyrri partur barnadansur; 23 børn, 15 foreldur/avvarðandi.**
Fyrra barnadansikvøld á vetrinum. Vit byrjaðu stundisliga og kvóðu:
1. Veturin kom/Burturá heiði,
2. Eg kendi mær ein ríkmann,
3. Nykursvísu,
4. Kongaríkið í Babylon,
5. Øskudólg og sópingarkona.

*Steðgur, har vit fingu sunkist og twix.*

6. Brestis kvæði (10 ørindir),
7. Kall og svein ungi,
8. Nú liggur ein kavafonn,
9. Mallebro,
10. Lítla Elsa.

Nú vóru børnini móð, so vit tóku ikki brot úr Sigmundskvæði yngra. Vit takka hesum røsku børnum, og teimum, sum vóru við teimum.

**Framhald av fjórða kvøldi, seinni partur. 35 fólk.**
Vit byrjaðu við at kvøða 31 ørindir av Brynhildartátti upp úr arki.

Brynhildartáttur, Kristian; nøkur sótu og kvóu við;
Veðratátturin, Karstin;
Fótbóltstátturin, Ivan.
*Kaffisteðgur; vertir: Jónhild og Erla.*
Skrímsla, Hans;
Steppitátturin, Kristian;
Finnbogaríma, Anfinnur.

**17-11-2017. Fimta kvøld á vetrinum, 30 fólk.**
Vit byrjaðu stundisliga at kvøða "Teir sigla so væl sín fríða knørr" sitandi, Louis skipaði.
Stolt Signhild, Kristian;
Spanialand og Myklagaard, Sámal Petur;
Grettir, 30 ørindir, Louis.
*Kaffisteðgur*
Bóndatátturin – av Økrum. Jóannes Djurhuus, úr Søldarfirði, ein av okkara limum, hevði eina søguliga frágreiðing um hendan tátt og miðgerðaslektina har suðuri. Tað var bæði gevandi og stuttligt at lurta eftir, tí nógv er at siga um teir menninar.

Ein annar av okkara limum, Alexius Midjord, er hovbingur og miðgerðarmaður um ein háls. Hann hevði nógv áhugavert at leggja aftrat. Eitt nú, táið Moe kom at bírætta Poul á Miðgerði, sum ikki var av guds bestu børnum, skilst. Eisini fortaldi Alexius okkum um langabba sín, Alexander Midjord, sum var við Lerken, skipi hjá Restorff, í Íslandi til fiskiskap í 1871, árið fyri sum Fox fór til fiskiskap.

Vit kvóðu so táttin við borðið, men seinni fara vit at kvøða hann á gólvi – eingin ivi um tað!
Seyðamaðurin á Sondum, Andras;
Jeg ser så mang et orlogsskib, Hans.

**24-11-2017. Sætta kvøld á vetrinum, avlýst fyri ring koyrilíkindir** Líkindini batnaðu so nógv, at vit ikki skuldu havt avlýst.

**01-12-2017. Sjeynda kvøld á vetrinum, 30 fólk.**
Hetta var tað árliga táttakvøldið, tá ið vit kvøða lætt og stutt.

Grettiskvæði, 29-61 ørindi, Louis. (Skuldið havt verið tað avlýsta kvøldið).
Mimirstáttur, Kathrina;
God nat og farvel, Andras og Kristian;

Á Dannimarks fløtum (Falkaríman), Kathrina;
O, kan du ikke mindes, Andras;
Ungersvend, Jóna;
Av øllum teim snekkjum, Jens.
*Kaffisteðgur.*
Bøhmerlandsdronningen, Karstin;
Streingirs vísa, Anfinnur;
Her nógv er at gera, Kristian;
Vit fáa tevatn og breyð, Anfinnur;
Fótbóltstátturin, Karstin;
Hvørjum man tykja vakurt hjá sær, Jens;
Væl komnir føroyingar her í vási, Oskar.
Nú var liðugt, men14 fólk fóru inn til Gott, ta nýggju veitslustovuna inni hjá OCD, har Vaðhorn hevði jólaborð. Tey vóru beint farin frá borði, og vit fóru at kvøða alt fyri eitt. Meginparturin av fólkinum kom uppí, og dansurin gekk stak væl – eingin ivi um tað. Vit kvóðu:
Stolt Signhild, Kristian;
Vit fáa tevatn og breyð, Anfinnur;
Tað hevur tókt millum føroyingar gaman, Dia;
Til Havnar vit fara, Kristian;
Føroyingar, sum her nú koma saman, Ivan;
Væl komnir føroyingar her í vási, Ivan.

Vit vóru samd um, at í ár var táttakvøldið hildið við manér.

**08-12-2017. Áttanda kvøld á vetrinum, 32 fólk.**
**Strandakvøld,** í Pensionistahúsinum, Heygsstøð 3, á Strondum. Vertir vóru Kára og tær á Strondum. Tað var ilsligt kavaveður, so vit væntaðu ikki nógv fólk.
Nú liggur ein kavafonn tindi á, Elin H.;
Har bylgjan leikar, (á skránni), Joen Carl;
Teir sigla so væl sín fríða knørr, (næstan allan) Kristian;
Torkilsdøtur, Jóna;
Strandatáttur, (á skránni), Joen Carl.
*Kaffisteðgur.*
Brúsajøkil, fyrra helvt, Hans;
Leirvíks Páll, Kathrina;
Ebbe Skammelsøn, 15 ørindir, Joen Carl;
Ungersvend bad sin flikke, (á skránni), Jóna;
Hann rann sær kátur upp um heyg, Jens;
Í Gøtu ein dag, Anfinnur;
Jákupsa skegg, (við fleiri "ókendum" ørindum), Joen Carl;

Eg eri jólamaðurin, Elin;
God nat og farvel, Kristian;
Sambandsfall, Joen Carl;
Vind op, vind op i rå, Elin.
Viðmerkingar: Her bleiv mest kvøðið stutt og lætt, m.a. tí,at “fremmand” fólk komu at vitja. Og vit vóru so løtt í huga. Onkur helt, at “Hann rann sær kátur” ikki hoyrdi til árstíðina, og onkur annar helt ikki, at mann kundi kvøða “Jólamannin”. Jú, tað kundu vit gott. Kristian heldur, at vit skulu taka “God nat og farvel” fleiri ferð aftrat í vetur, so øll fara at duga hann. Gott hugskot!

Hetta var síðsta kvøld í tí Harrans ári 2017.

**01-01-2018. Nýggjárskvøld, nýgginda kvøld á vetrinum. 31 fólk.**
Vit væntaðu ikki so nógv fólk, tí tað er arbeiðsdagur hjá nógvum dagin eftir, og so eru fólk móð eftir nýggjárshald. Tað vóru fleiri fremmand fólk, og tí løgdu vit okkum mest eftir løttum. Vit guldu kr 50,- sum atgongumerki.
Stolt Signhild, Kristian;
Mær dámar bjór og brennivín, Ivan;
Teir sigla so væl sín fríða knørr, Kristian;
Størke Tidrik, Leivur;
Herr Sinklar, Kathrina;
Tá eg verði stórur, Andras.
*Kaffisteðgur.*
Dvørgamoy I, fyrsta triðing, Anfinnur og Louis;
Gudbrandskvæði, Louis;
Huldugentan, Helena;
Her nógv er at gera, Kristian;
Mallebro, Kathrina.

**05-01-2018. Tíggjunda kvøld á vetrinum, 42 fólk.**
Hetta var okkara trettandakvøldsdansur, so vit roknaðu við eitt sindur av fólki, og so var: 42 fólk, sum ikki er einki í okkara lítla felag – eini 40 procent av tí samlaða limaskaranum.
Rútusarvísa var fyrst á skránni, og hana tóku vit sitandi, tí hon er rættiliga ókend, og Kári Sverrisson hevur eitt serligt lag til hana, eitt lag, sum hann hevur funnið úr eini nótabók við gomlum løgum.
Stolt Signhild, Kristian;
Rútusarvísa, Kári;
Vågenat, Johannus;
Kom upp á fjallatind, Zacharias.
*Kaffi og prát.*
Skrímsla, Hans;

Grettir, 1, triðingur, Louis og Kristian;
Snekken ligger på landet, Sjúrður;
Melis æt ein drongur, Ivan;
Teir sigla so væl sín fríða knørr, Kristian;
Sverra ríma, Tóta.

Viðmerkingar: Melis er ein skemtivísa, ið Tummas N. Djurhuus yrkti til eina veitslu í Havnar fimleikarafelag í 50-unum. Sverrarímu yrkti Jóna Petur uppi í Trøð í 1896 um Sverra kong. Kanska verður hendan á skránni næsta ár. jd.

**12-01-2018. Ellivta kvøld á vetrinum, í Glyvr'Hanusarhúsi. 55 fólk.**
Hetta var okkara árliga kvøld í Norðragøtu, og tað plagar at vera gott. Hesaferð blivu vit betri mannaði enn fyrr, eisini tí at nøkur gøtufólk komu í dans. Nøkur børn vóru eisini, og tað merkir fyrsta part av tí, ið bleiv kvøðið.
Nú liggur ein kavafonn tindi á, Kristian;
Øskudólgur og sópingarkona, Kári;
Veturin kom/Burtur á heiði, Tóta og Sverri;
Kongaríkið í Babylon, Jens;
Sigmundskvæði yngra, 25 ørindir, Kristian; Runsivalsstríðið,
til 80. ørindi, Leivur og Karstin;
Harpuríma, Anna og Sanna.
*Kaffisteðgur.*
Tístramstáttur, Kristian og Kári,
Hjalmar og Hulda, Joen Carl og Sanna;
Prins Kristian, Ivan;
God nat og farvel, Kristian og Andras;
Nú gerast kvøldini myrk og long, Sanna;
Føroyingar sum her nú koma saman, Ivan;
Her nógv er at gera, Kristian.

**19-01-2018. Tólvta kvøld á vetrinum; blískaparkvøld, og Vága dansifelag var gestur. Frá teimum komu ca. 20; frá okkum vóru u.l 55, tilsaman ca. 75 fólk.**
Eitt blíðskaparkvøld er eitt dansikvøld, har eitt sindur meir verður gjørt burturúr. Fólk fáa ein vælkomstsnaps - og kunnu keypa sær sodavatn og øl. Í steðginum verður boðið ein lættari máltíð við kakum og kaffi omaná. So verður kvøðið víðari. Hetta kvøld til kl. 01.00, táið gestir okkara fóru vestur aftur.

Ormurin langi, Louis H. og Anfinnur H;
Grindavísan, Edvard Joensen;
Leivur Øssursson, Sámal Petur;
Kom upp á fjallatind, Zacharias D;
Seyðamaðurin á Sondum, Edvard Joensen;

*Matarsteðgur*
Gudbrandskvæði, Louis H.;
Rudisar vísa, Kári Sv;
Áttamannafarið, Jens D;
Streingirsvísa, Anfinnur;
Brúsajøkil, Hans P;
Norden for Trondhjem, Jónvør Petersen.

Hetta var eitt dansikvøld av teimum heilt góðu.

**26-01-2018. Trettanda dansikvøld á vetrinum: barnadansur kl. 20-21,** har vit kvøða slíkt, sum børn duga; í steðginum sunkist og twix. **Gott 45 børn og eini 25 foreldur/avvarandi.**
Í barnadansi má tað mesta ganga aftur, men okkurt 'verri' má eisini vera. Vit valdu Sigmundskvæði yngra til høvuðskvæði: Frá byrjan til teir settu eld á Sigmunds hús. So frá tí, at Sigmundur kom til Sandvíkar, og hann "var grivin í sand og grús". Sum ókent tóku vit eisini Flóvan Bænadiktsson, fyrra part, har børnini kvðu niðurlagið av hjartans lyst – og vónandi lærdu seg lagið. Eina lítla frágreiðing um innihaldið høvdu tey fingið beint áðrenn.

1. Veturin kom/Burtur á heiði
2. Nú kiggur ein kavafonn tindi á
3. Sigmundskvæði yngra. Sí omanfyri
4. Kall og svein ungi
5. Øskudólgur og sópingarkona
6. Kongaríkið í Babylon
7. Flóvin Bænadiktsson, helvtina

*Steðgur við sunkist/twigs/kaffi*

8. ~~Ormurin langi~~
9. ~~Eg kendi mær ein ríkmann~~
10. Nykurs vísa
11. Stat op Santkta Simeon

Dansurin gekk væl, og tað er m.a.tí, at tað verður kvøðið við børnunum í barnagørðum og í skúlum við teim minstu flokkunum. Einki stríð við at halda stig. Okkurt máttu vit sloyfa, tí tíðin ikki strekti til. Hugaligt!

**Seinni partur av trettanda dansikvøldi. 25 fólk.** Á skránni vóru Kong Sverke og Jómsvíkingar.

**Langalív**, Leivur. Hetta er Runsivalsstríði frá 80. ørindi og út, og tað er tann mest dramatiski parturin av hesum kappakvæði, har Rólant jall og keisarin Karlamagnus eru hetjurnar fram um allar.
Gøtuskeggjar, 2 triðingar, Andras.
**Kong Sverke**, Høgni, sum hevur verið til skips og ikki hevur verið við í vetur fyrr enn nú.
**Jómsvíkingar**, Samal Petur. Tað mesta av fólkinum var farið til hús, og vit vóru farin at rigga av, tá ið Samal tók Jómsvíkingar. Meðan støvsúgvarin brummaði, kvóðu vit 8 fólk Jómsvíkingar. Tað var framúr stuttligur dansur. Eitt dømi um, hvussu fá fólk skulu til fyri at fáa góðan dans.

**29-01-2018. Dansur í Tofta skúla. 10 fólk úr okkara felag.**
Umleið 15 tey seinastu árini hava vit verið biðin at koma í skúlan ein dag fyri fastalávint at kvøða við børnunum fyri styrkja kvøðingina. Vit kvøða fyrst við teimum smærru, síðani við teimum størru við einum morgunmatasteðgi ímillum. Alt hetta tekur tveir tímar. Nú duga øll stig, so dansurin gongur væl, og tey kvøða hart, reystmælt sum toftabørn eru.
Nógv eru tey somu, ið koma út á Toftir. Hendan dagin vóru vit: Høgni D, Meinhard P, Kristian J, Leivur S, Marita D, Óli Hans O, Jóna D, Ásmund H, Kathrina H og Jens D.

**02-02-2018. 14.dansikvøld á vetrinum, hugnakvøldið. 59 fólk.**
Hetta er okkara høvuðskvøld fyri egnum limum. Í nógv ár hava vit havt ræst kjøt, men hesaferð var tað 'høgt belagt' smyrjibreyð frá Sjókaféini, umframt breyð við góðum føroyskum viskera. Omaná fingu vit dessert.

Fólk fingu durasnaps, Einar's, og borðhaldinum stýrdi Jóannes Dj. við hepnari hond. Sum nú í fleiri ár vóru vit í tí nationalromantiska krókinum, soleiðis at skilja, at vit sungu úr Føroya fólks:
Fagurt ert tú fosturlandið, Norrøna mál, Faðirs míns hond, Til vildar øllum kann eingin gera, Mítt vakra heim, Alt hann átti á fold.

Sámal Petur og Dia Ellindsson høvdu báðir góðar hugleiðingar: Sámal um kvøðing fyrr og nú, og Dia hevði fimm smár yrkingar. Traditionen tro seldu vit lutaseðlar, og tað stuðlar tí fíggjarliga væl. Til keyps fekst veðrur, reyð- og hvítvín, smáar fløskur, og sodavatn.

Eftir borðhaldið kvóðu vit Grindavísuna (Høgni), Jeg ser så mangt et orlogskib (Ivan), Brókartátt (Høgni) og Veðratáttin (Karstin).

Fólk hildu á til út ímóti kl. 01.00 og klokkan 01.30 var húsið ruddiligt, og vit, sum stóðu fyri, fóru til hús. Móð og vælnøgd.

**05-02-2018. Dansur í Skúlanum við Løkin. 13 fólk.**

Hendan mánadag beint fyri middag vóru vit 10 fólk frá felagnum - og trý, sum vit eiga innan fyri múrarnar - í Skúlanum við Løkin og kvóðu við næmingunum.

Dansurin gekk væl - øll vóru uppií, og tey duga væl stig. Vit kvóðu lætt, tí sum ein lærarinda helt fyri: Tað skal vera ein góð uppliving. Rætt hevur hon!

Táið "Stat op santa Simeon", tann deiliga bíbilsøguvísan, hevði rungað, fóru tey smærru í tíma, meðan 8. var eftir, tí tey skuldu kvøða Tistramstátt.

So kvóðu vit Tístram, sum eingin annar enn Kristian Jacobsen úr sama 8. klassa skipaði, annar av okkara ungu kvæðarum. Tað var róligur og hátíðarligur dansur, har vit úr felagnum mest lurtaðu og kvóðu niðurlagið, tí vit duga ikki tað kvæðið væl.

Tístram og Ísinfrú eru jú "Tristan und Isolde", sum Wagner hevur gjørt til operu, sum vit umtalaðu stutt eftir kvøðingina.

Hetta var ein góð løta, og vit hava slett ikki mist vónina um tann føroyska dansin.

**08-02-2018. Kvæðaløta í Eysturoyar ellisheimi. 12 vaksin og 15 børn.**

Trivnaðarnevnd heitti á okkum um at koma at kvøða eina løtu fyri og saman við teimum gomlu - og eins og í fjør hava nøkur børn við, tí ljósar barnarøddir lívga tey gomlu so upp. Skrivarin, sum kennir toftabørn væl, hevði so boðað serliga 2. og 4. klassa, sum kvøða stak væl. Tað komu eini 15 tilsamans, næstan bara gentur – og onkrar úr øðrum klassum.

Børnini kvóðu – skipaðu meir og minni øll - meðan vit vaksnu vóru uppí, so tey áttu kvøldið:

Veturin kom/Burtur á heiði, børnini;

Nú liggur ein kavafonn, 4. klassi, børnini;

Bjerget ligger langt ud i skoven, 4. klassi;

Nykursvísa, 4.klassi.

*Kaffisteðgur*

Stærke Tidrik – nøkur ørindir, eftir ynski frá teim gomlu (Joen Carl);

Sigmundskvæði yngra, 19 ørindir, Kristian;

Bøhmerlandsdronningen, nøkur ørindir, Joen Carl;

Tá eg verði stórur, Anfinnur,

Her nógv er at gera, Kristian.

Stak hugnalig løta, halda vit, og tað var heilt væl av fólki, bæði búfólk og avvarandi.

**09-02-2018. Aðalfundur. Samfundet Sverigige-Færøerne. 32 frá okkum, 21 svenskarar.**

Aðalfundurin var eftir lógini. Dia Ellindsson var sum so ofta fyrr fundarstjóri. Á skránni var tað vanliga: frágreiðing frá formaninum og frá okkara umboð í Sláið ring. Roknskapurin, sum bleiv góðkendur einmælt. Nevndarval: tveir, Jens og Ivan gingu út, men einmælt afturvaldir. Kathrina afturvald sum umboð í Sláið ring, og eykaumboð Karstin í Húsinum. Anna Sørensen afturvald kassameistari og Sveiney Sverrisdóttir grannskoðari. 20 fólk á aðalfundi, og tað er ein lítil fimtingur av felagnum.

**Dansurin byrjaði kl. 21.00 stundisliga**, tí tá komu gestir fra Samfundet Sverige-Færøerne. Tey høvdu etið døgurða á Hotel Runavík, har tey skuldu gista um náttina. Dagin eftir skuldu tey til Dals at kvøða saman við Stígum fast, og sunnudagin seinnapart skuldu tey kvøða í Nólsoy.

Hesi fólk hittast nakrar ferðir um árið at kvøða 'ballad-dans'. Hesin áhugi í Svøríki stavar frá ferðini, sum hin norska mentakvinnan Hulda Garborg gjørdi til Føroyar beint eftir 1900 fyri at læra seg føroysk kvæðir og dans – og fáa norðbúgvar at fara at kvøða.

Ved Kristiansand, Jóannes Djurhuus,

Kong Sverke, Høgni Debes,

Sigmundskvæði yngra, 25 ørindir, Kristian,

Ebbe Skammelsøn, á svenskum,

Ebbe Skammelsøn, 10 ør. Joen Carl.

*Kaffisteðgur.*

Bøhmerlandsdronningen, Karstin,

Byssan lull, Jens,

Svensk vísa, svenskari skipaði,

Stolt Signhild, Kristian og ein svenskari skipaðu í felag,

So vakrar moyggjar, Jens,

Vælkomnir føroyingar her í vási, Høgni,

Hvørjum man tykja vakurt hjá sær, Jens,

Mallebro, svenskarar, so tóku vit trý tey síðstu trý ørindini,

Der stod en jungfru och øste vatten, svenskari.

Nú var var klokkan út ímóti midnátt, og svenskararnir takkaðu fyri seg og góvu okkum eina gávu. Kvøldið eftir hugnakvøldið er ofta eitt sindur linligt, men soleiðis var ikki í ár. Um tað ikki høvdu verið so stak sjúkligar tíðir, høvdu vit verið fleiri.

**12-02-2018. Fastalávints-mánakvøld. 21 fólk.**

Vit lótu upp longu kl. 20.30, so vit kunnu vera liðug í sámiligari tíð. Hetta kvøld gjalda øll vaksin kr. 50,- sum stuðul til felagið. Fólk fingu kaffi og te við eini smákaku afturvið. Vit høvdu hopað uppá fleiri fólk, men tað er hesin arbeiðsdagurin dagin eftir – og so var tað krím og hálka, sum gjørdu sítt.

Stærke Tidrik, Leivur,

Landbukkutáturin, Hans,

Dronning Dagmars død, Kristian,

Føroyingar, sum her nú koma saman, Joen Carl,

Tað hevur tókt millum føroyingar gaman, Dia,

Sambandsfall, Joen Carl,

Jákup á Møn, ca. 30 ørindir, Joen Carl,

Her nógv er at gera, Kristian,

Der går dans på Ribergade, Leivur,

Vit fáa tevatn og breyð, Anfinnur,

Joen Carl telur jólini:

Mær gav santa Mortan,

Stat op santa Simeon,

Bjerget ligger langt ud i skoven.

*So var hesin dansiveturin liðugur: aftur ein góður dansivetur.*

**21-04-2018. Barna-landsdanstevna í Sandoy. 26 børn og 18 vaksin.**

Eysturoyar dansifelag hevur verið umboðað á barnalandsdansistevnuni síðani 2010 – við skrivarnum, Jens Dalsgaard, sum forsprákara. Tofta skúli hevur verið høvuðsbasa, men har heur undirtøkan verið víkjandi – tíverri. Í ár meldaði bara ein næmingur til í fyrstu atløgu.

Men táið avtornaði, vóru vit 26 børn og 18 vaksin. Av Toftum 14, úr Runavík, 12 úr Gøtu 13 og 4 úr Kollafirði. Umframt tað vóru Kathrina og Sámal frá Norðskála eisini við. Á skránna fingu vit Nykursvísu, Í Gøtu ein dag og Stolt Signhild. Men vit kvóðu meir enn tað! Hetta var ein rimmardagur og væl skipaður “frá begynnilsi til enda.”

**24-04-2018. Lamba – Funningur.**
Í viku 17 var mentanarvika í Runavíkar kommunu, og tá var boð eftir Eysturoyar dansifelag.

**Norskaløva í Lamba.**
Fullsettur Gamliskúli í Lamba, har Magnus Rasmussen greiddi frá um hendan gamla eystindiafararan, sum legði beinini á Lambavík nýggjársaftan 1707.

Tiltakið endaði við, at nøkur, eini 10 fólk kvóðu Kom frem i denne tid, sum Kathrina Hansen skipaði. Hon tók 1. til 4. ørindi og so 18. til 22. ørindi; hetta fyri ikki at keða fólk, tí Norskaløva er ikki løtt at fylgja við í hjá tí, sum ikki dugir.

Okkara partur endaði við, at Kristian tók Stolt Signhild, sum eisini gekk væl, og tá komu heilt nógv fólk uppí.

**Alment dansikvøld í Funningi**
Vit høvdu eisini lovað at hjálpa til við dansinum í Funningi, sum skuldi byrja kl. 22.00 sama kvøld í skúlanum, ið nú virkar sum kulturhús í bygdini. Tað var Funnings bygdafelag, sum stóð fyri tiltakinum.

Fyri kaffi:
Vaagen, Ivan formaður;
Tá eg verði stórur, Kathrina;
Til Havnar vit fara, Kristian;
Vælkomnir føroyingar her í vási, Ivan;
Harra Pætur og Elinborg, Kathrina;
*Eftir kaffi:*
Teir sigla so væl sín fríða knørr, Kristian;
Tað hevur tókt millum føroyingar gaman, Anfinnur;
Nordan for Trondhjem, Hjalmar;
Mær dámar bjór og brennivín, Ivan;
Mallebro, Kathrina;
Melis, Ivan;
Vit fáa tevatn og breyð, Anfinnur;
Sinklars vísa, Kathrina;
*Suppa.*
Leivs kvæði, Kristian.

Eysturoyar dansifelag legði seg hetta kvøld eftir tí lættara partinum: meiri vísur enn kvæðir, og tað dámdi fólki væl. Vit hava kvøðið nógv long kvæðir í vetur, og øll dansikvøld nýtast ikki at líkjast.

Frá okkum vóru vit yvir 30 fólk, og væl av funningsfólki var eisini – nøkur úr Runavík og av Toftum við.

Nú kann summarið koma!
JensD

**Summardansur**
Tann 9.apríl fekk skrivarin áheitan frá VisitRuanvik um at kvøða fyri útlendskum gestum frá turistskipum í Runavík tann 24.juni, 21.juli og 11.august. Vit skuldu fáa eitt sindur afturfyri. Nevndin helt, at vit skuldu siga ja, og tað gjørdu vit.

**24-06-2018. Turistaskip, Runavík**
Fingu ein kaffimunn í Kunningarstovuni.
Flóvin Bænadiktsson, 12 ør. + tað síðsta, Ivan;
Frágreiðing, Eingilsk: Kristian;
Ormurin langi, 13 ør. + tað síðsta, Annfinnur;
Tá eg verði stórur, 11. ør. + tað síðsta.
Hetta tók góðar 20 minuttir, og veðrið var gott, kvøðið við kunningarstovuna. Fleiri útlendingar komu uppí – og eisini føroyingar.

**21-07-2018. Turistaskip og laksatorg, Runavík**
Kaffimunn á Kunningarstovuni, so oman á bryggjuna sunnan f. Nevið at kvøða.
Frágreiðing á eingilskum: Kristian, og Jens týddi til týskt, tí nógvir týskarar vóru við.
Flóvin Bænadiktsson, 12 ør. + tað síðsta, Ivan;
Ormurin langi, 13 ør. + tað síðsta, Kristian;
Tá eg verði stórur, 11 ør. + tað síðsta, Kathrina.

**27-07-2018. Turistaskip, Runavík - eyka**
Hetta var óvæntað vitjan við stuttum skotbráð. Skipið slapp ikki at í Havn av ólavsøkuni. Tað var eitt sindur vátt, so vit kvóðu inni í kunningarstovuni.
Stúvstappað høll.
Frágreiðing, eingilsk, Jens
Flóvin Bænadiktsson 12 ør. + tað síðsta, Ivan,
Ormurin langi, 11. ør. + tað síðsta, Anfinnur,
Mallebro, Jens.

**11-08-2018. Turistaskip, Runavík**
Eftir drekkamunn í kunningarstovuni kvóðu vit sunnan fyri býráðið.
Frágreiðing, eingilsk, Jens
Flóvin Bænadiktsson, 12 ør. + tað síðsta, Ivan,
Ormurin langi, 11 ør. + tað síðsta, Jóannes Dj.

Mallebro, Ketty.

**23-09-2018. Turistaskip, Runavík – eyka**
Skipaði torgaði ikki til Íslands fyri veður, men tók Runavík ístaðin, so her var skotbráðið heilt stutt. Tað var ilsligt, so kvøðið varð inni á kunningarstovuni.
Frágreiðing, eingilsk, Kristian;
Flóvin Bænadiktsson, 12 ør. + tað síðsta, Ivan;
Ormurin langi, 11 ør. + tað síðsta, Anfinnur;
Mallebro, Kristian.

Nú skuldi verið liðugt, men nógvir turistar, fleiri heilt gamlir, sluppu ikki inn, og aðriri vóru ikki komnir í land. Tá kom áheitan um at kvøða niðri á bryggjuni, men har var so kalt, at fólk mátti koma umborð. Fyrst máttu pass ella koyrikort til, og tað tók sína tíð. Kl. 16.00 fóru fólk umborð at kvøða:
Frágreiðing, Kristian;
Stolt Signhild, Joen Carl;
Í Gøtu ein dag, Anfinnur,
Her nógv er at gera, Kristian.
Fólk fingu stóran blýðskap, sum Doris Djurhuus, ein av okkar, hevur skriva góða frágreiðing um (lesist á okkara fb-síðu. Skipið mátti útseta fráferðina eitt korter, so at okkara fólk slapp í land.

Kvøðingin í Runavík gekst væl, og vit vóru eini 15 fólk, onkuntíð 20, og lokal fólk hjálptu eisini. Reklamu hava vit fingið góða - og góðar afturmeldingar.

Ultimo september 2018
Dagbókina førdi skrivarin, Jens Dalsgaard.